# BÓKASÍÐAN

*bøkur, bøkur, bøkur...*



## Klassikarin: The Catcher in the Rye

*J.D. Salinger, The cather in the Rye, 1951*
*Umsett Klaus Rifbjerg, Griberen i rugen, Gyldendal, 2004*

Tað vóru sera deildar meiningar um avrikið, tá Klaus Rifbjerg í heyst sendi eina nýggja umseting av amerikanska klassikaranum *The Catcher in the Rye* eftir J.D. Salinger á bókamarknaðin. Onkur helt nýggju umsetingina vera eitt satt fornermilsi móti bæði Salinger og fyrru donsku útgávuni, Forbandede Ungdom. Onnur fegnaðust um, at søgan hjá Salinger um Holden Caulfield eisini á donskum nú umsíðir hevði fingið ta røddina, ið tók lesarar og ummælarar á bóli, fyrstu ferð bókin kom út í 1951.

Í nýggju umsetingini er upprunaliga heitið umsett beinleiðis úr enskum til *Griberen i rugen*, umframt at Rifbjerg hevur broytt málburðin nakað, so hann í ávísum førum mest líkist eini blanding av ’50ara og modernaðum ungdómsslang. Eitt áhugavert val, sum ger kreppurakta Holden bæði tíðarbundan og -leysan, meðan hann enn einaferð bannar og svørjir seg gjøgnum søguna sum ein heilur ungdómsuppreistur, ið er farin í hernað móti øllum tí falska her í verðini.

*The Catcher in the Rye* var mest sum kravdur lesnaður á miðnámsútbúgvingum í síni tíð, og tað hevði onki gjørt, um hon framvegis er tað. Áhugavert kundi tað jú eisini verið at gruna yvir, hvussu nógv skaldslig góðska í grundini telur í mun til kenslur í kjakinum um ein nýggja umseting av einum gomlum klassikara.

**ave**




# Ungu lesararnir



*Tær tríggjar Oyvør Dam Lassen, bókavørður, Hallgerð Færø og Árna Maria Fossdalsá, sum dagliga starvast á Klaksvíkar bókasavni, halda tað vera hugaliga at so nógv ung dagliga støkka inn á gólvið*

**Heil fitt av ungdómi hevur sína dagligu gongd á Klaksvíkar Bókasavni. Tey flestu koma at lána eina av mongu fantasibókunum, meðan onnur heldur hava hug at sita og telva ella surfa á netinum eina løtu. Men eisini tey hava sum oftast eina bók við sær heimaftur**



Ungu lánararnir á Klaksvíkar Bókasavni ríða framvegis við á Harry Potter og fantasibylgjuni. Hví júst hetta slagið av bókum er vorðið so væl umtókt millum tey ungu, er ilt at siga, heldur Oyvør Dam Lassen, bókavørður, men uttan iva hongur tað saman við nógvu reklamuni, hesar bøkurnar fáa allastaðni.

– Eg haldi ikki, at hesar fantasibøkurnar eru so skaðiligar fyri børnini og tey ungu, sum onkur vil vera við. Uppá ein máta eru tær nokk bara eitt nýtt slag av ævintýrum, sum børn og ung jú altíð hava lisið, sigur Oyvør, sum heldur tað vera hugaligt, at tey ungu spyrja serliga nógv eftir teimum føroysku týðingunum, tí tað gevur teimum uttan iva hug at lesa aðrar føroyskar bøkur eisini. Til dømis eru bøkurnar hjá Jógvani Isaksen, *Teir horvnu kirkjubøstólarnir* og *Brennivargurin* millum tær best umtóktu í løtuni.

Av teimum føroysku týðingunum er trýverkið, Myrkursins frumevni, hjá Philp Pullman eisini serliga nógv eftirspurt millum ungu lánararnar og so sjálvandi eisini bøkurnar um Harry Potter.

– Tað ávirkar eisini rættiliga nógv lánihugin hjá teimum ungu, tá ein bók verður lisin í útvarpinum. Beint nú spyrja tey nógv eftir *Skattaoyggin*, og bøkurnar um *Tsatsiki* eru framvegis millum tær mest útlæntu bøkur-nar til ung, sigur Oyvør. Hon leggur afturat, at tey flestu dáma eisini væl at sita og blaða í ungdómsbløðunum, eitt nú "Vi unge", "Wendy" og heilsublaðnum "Ung" ella at lána onkrar av teimum mongu teknirøðinum heim við. Teknirøðirnar hava nevniliga altíð verið serliga væl umtóktar, og onki bendir á, at tær fara av móta í bræði.

**ave**

## Bókatíðindi: 21 sjónarhorn

Til unga lesaran hevur Bókadeild Føroya Lærarafelags júst útgivið bókina Seturskúlin.. Skrivað bókina hevur Moni Nilsson-Brännström, og Bergur Rasmussen hevur týtt úr svenskum. Flestu kenna bøkurnar hjá henni um Tsatsiki, sum Bókadeilin eisini hevur givið út, og sum verða nógv lisnar hjá okkum. Hendan er ikki minni áhugaverd. Hon snýr seg um eina skúlaflokk, sum fer á seturskúla, har tey búgva á vallaraheimi, og upplivilsini, tey verða fyri, eru mong og sera hjartanemandi. Høvuðsforteljarin í bókini er Malan, sum skrivar dagbók. Hon er eygleiðarin, sum sær alt frá í erva, men øll hini í flokkinum sleppa at siga sína søgu, so hendingarnar á seturskúlanum verða sagdar frá 21 ymiskum sjónarhornum. Og tað er líka so ørkymlandi, sum veruleikin mangan er, tá ið tú ert ung.

Seturskúlin er 133 bl.s. og kostar 140 kr.




## Viðmæli: Ikki fyri sartar sálir

*Ingrid Bjarnastein*

*Melissa Panarello,*
*Cento colpi di spazzola prima di andare a dormire*
*Umsett Grethe Bonde,*
*100 tag med hårbørsten før sengetid,*
*Forlaget Ries, 2003.*

*100 tag med hårbørsten før sengetid* er skrivað í dagbókaformi, og ungi italienski rithøvundurin er bert 14 ára gomul, tá hon byrjar at skriva. Og kanska hetta er tað mest merkisverda, tí bókin snýr seg um, hvussu tann unga gentan lærir sín kropp, sín hug og sín seksualitet at kenna. Bókin hevur verið slóðbrótandi í stranga katólska samfelagnum í Italia. Eitt nú hevur verið nevnt fleiri ferðir, at gentan sat í garaguni og skrivaði hana, tí foreldrini vildu ikki hava eina teldu inn í húsið.

Ósmæðið fortelur hon um eyðmýkingar, fragdir, lystir, royndir, og um hvussu hon veksur frá at vera ein óvitandi, keddur tannáringur til eina unga og kanska enntá glaða kvinnu.

Um ein er eitt sindur sartur, er helst best at lata bókina verða standandi á hillini í bókhandlinum. Tað verður nevniliga ikki spart uppá tær erotisku hendingarnar, sum til tíðir kunnu gerast grovar, ótespiligar og smakleysar.

Avgjørt ein ungdómsbók í betra endanum, sum fangar frá fyrstu síðu. Men hon er avgjørt bert fyri tey, ið kunnu tola tað.

